


Hvis du ikke er til et 8-16 job

maersk-skibsofficer.dk

Du har mod på en uddannelse, hvor du bruger både hoved og hænder, og som kan give adgang til et vellønnet job med alsidige karrieremuligheder. Du tænder på teknik, og du kan fastholde overblik såvel som fokus på detaljen. Du vil hurtigt få ansvar og mulighed for at prøve kræfter med dit fremtidige job i en af verdens største handelsflåder.

Bestil informationsmateriale og ansøgningsskema på **maersk-skibsofficer.dk**, hvor du også kan ansøge online, og læse mere om uddannelsen og jobbet. Kommer du ud fra din ansøgning i betragtning, modtager du herefter en personlig indkaldelse til en optagelsesprøve. Du kan også ringe til os på **+45 3398 7000**. Kontakt os allerede i dag!

Vi søger 100 studerende til skibsofficers-uddannelsen.
Studiestart 31. juli. 2006

**Vi holder optagelsesprøve den 3. maj i Thorshavn.**

MÆRSK


# Fiskivinnuskúlin hevur góð úrslit at vísa á



*Poul Arni, Hanna og Sjúrður eru næmingar av Fiskivinniskúlanum*

FISKIVINNUSKÚLI

Fiskivinnuskúlin í Vestmanna er kendur fyri góðu úrslitini í European Business Game (EBG) kappingini. Næmingar á skúlanum hava tvær ferðir vunnið endaligu kappingina, har miðnámsskúlar úr øllum Evropa hava luttikið. Men næmingarnir klára seg eisini sera væl eftir, at teir hava lokið prógv á Fiskivinnuskúlanum. Somu næmingar lata eisini sera væl at útbúgvingini teir hava fingið á Fiskivinnuskúlanum.

### Poul Arni Jacobsen tók HIF prógv í 2005

Poul Arni Jacobsen hevur verið næmingur á Fiskivinnuskúlanum í trý ár, hann tók HIF prógv síðsta summar (2005). Hann sigur, at hann er sera væl nøgdur við útbúgvingina á Fiskivinnuskúlanum.

Hann nevnir, at onkur kanska heldur, at undirvísingin á skúlanum er avmarkað til fisk og fiskivinnu, men tað er ikki rætt. Útbúgvingin gevur nógvar møguleikar. Í heyst søkti hann og fekk starv hjá grannskoðaravirkinum KPMG í Havn.

Men nú hevur hann gjørt av at royna seg í egnum virki. Hann hevur saman við tveimum vinmonnum keypt fyritøkuna, sum rekur Eclipse, Café Natúr og REX.

Tað verður ein spennandi avbjóðing, sum hann gleðir seg til at fara undir, hóast hann bert er 20 ára gamal. Poul Arni byrjar í nýggja stjórastarvinum 1. apríl.

### Hanna Skorastein lærir til sjúkrasystir

Hanna Skorastein tók HIF prógv á Fiskivinnuskúlanum í 2002.

Fyri tveimum árum síðani fór hon at læra til sjúkraøktarfrøðing á Sjúkraøktarfrøðiskúla Føroya. Fyri at sleppa í hesa læru krevst miðnámsútbúgving, sum hon tók á Fiskivinnuskúlanum í 2002.

Hanna sigur, at fleiri av lærugreinunum, sum hon hevði á Fiskivinnuskúlanum, eru komnar henni til góðar, nú hon lærir til sjúkraøktarfrøðing. Í hesum sambandi nevnir hon alis- og evnafrøði, støddfrøði, lívfrøði og smáverulívfrøði.

Somuleiðis sigur hon, at á Fiskivinnuskúlanum verður nógv arbeitt við verkætlanum, og tað er eisini komið henni til góðar á Sjúkraøktarfrøðiskúlanum

### Sjúrður Hammer lesur lívfrøði

Sjúrður Hammer tók HIF-prógv á sumri 2002 og byrjaði at lesa lívfrøði á universiteti í Aberdeen árið eftir.

Sjúrður letur væl at lestrinum og lestrarumhvørvinum. Hann sigur, at við próvnum frá Fiskivinnuskúlanum er hann fakliga væl fyri samanborið við tey lesandi, sum hann lesur lívfrøði saman við.

Hann greiðir frá, at studentar úr øðrum londum, ("international students") hava rættuliga góðar sømdir. M. a. nevnir hann, at tey lesandi hava eitt slag av bústaðartrygging. Henda skipan tryggjar øllum studentum bústað fyrsta lestrarárið, og tað kemur sera væl við ikki at hava henda trupulleika at dragast við, tá man byrjar eina útbúgving í einum fremmandum landi.


asfalt

Frá 2. til 3. juni
Frá Føroya Banka til tónleikin

TÓRSHAVNAR KOMMUNA
miðlahúsið í Vágsbotni
faroeJet
FØROYA BANKI

REPROZ